## Vestas álit á Obama

Tann danska vindmylluverksmiðjan Vestas væntar sær sera nógv av tí nýggja forsetanum í USA og stjórn hansara. Sambært Børsen eru vónirnar so góðar, at Vestas er ein av teimum fáu fyritøkunum í Danmark, sum ikki hevur skert sína framleiðslu, síðani fíggjarkreppan byrjaði. Barrack Obama hevur fleiri ferðir sagt, at stjórn hansara fer at leggja størri dent á varandi orkukeldur, og Vestas væntar sær at fáa lut í einari komandi útbygging í USA.



# Røkka vit ikki á mál, mugu o



**Framvegis er ikki greitt, um tað fer at eydnast Maru Seafood at endurreisa virksemið á Kósini, soleiðis at virkið kann lata uppaftur. – Nú má greiða fáast á hesum. Røkka vit ikki á mál, mugu onnur taka yvir, sigur Jóhan Páll Joensen, stjóri í Maru Seafood**

KREPPA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Enn er einki virksemið komið í gongd aftur á flakavirkinum Kósini í Klaksvík, og í morgun visti Jóhan Páll Joensen, stjóri í Maru Seafood ikki at siga, um nakað – ella einki – fer at spyrjast burtur úr royndunum hjá samtakinum at endurreisa virksemið.

- Vit arbeiða framvegis við málinum, og ymisk uppskot eru frammi. Nú ber ikki til at bíða leingi aftrat, men í løtuni veit eg einki at siga um, hvørt vit fara at røkka undir land við eini endurreisn ella ikki.

Jóhan Páll Joensen, stjóri í Maru Seafood, sigur, at tað framvegis er felag hansara, sum roynir at finna ymiskar útvegis, og eisini verður tosað við aðrar partar um møguleikar.

- Ymiskar forhandlingar eru í gongd, men í løtuni er ógjørligt hjá mær at siga, um nakað fer at spyrjast burtur úr.

Stjórin í Maru Seafood er greiður yvir, at fólk, sum høvdu sítt livibreyð á virkinum, eru spent eftir at vita, um nøkur endurreisn er í eygsjón.

Herfyri segði nýggi borgarstjórin í Klaksvíkar kommunu, Gunnvá við Keldu, at Klaksvíkin kann ikki umvera Kósavirkið.

- Vit hava kunnað borgarstjóran og soleiðis býráðið um støðuna, sigur Jóhan Páll Joensen.



*- Megna vit ikki at endurreisa virksemið, mugu onnur taka yvir, sigur Jóhan Páll Joensen, stjóri í Maru Seafood*

### Skipini sigla

Enn er nakað av framleiðslu á virkinum Norðís Seafood, og framvegis sigla línuskipini, Grani og Fugltúgvan.

Herfyri segði Jóhan Páll, at virkið á Eiði og Fugl-

# Fleiri ungir fiskimenn

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tey, sum standa fyri heimasíðuni hjá Føroya Reiðarafelag, hava hugt í FiskeribladetFiskaren, sum herfyri skrivaði, at talið av ungum fiskimonnum í norsku fiskivinnuni er veksandi. Hetta vísa tøl frá Fiskeridirektoratet.

Talið av fiskimonnum yngri enn 20 ár øktist úr 189 í 2007 upp í 199 við árlok í 2008. Av hesum høvdu 192 sjólívið sum høvuðsstarv móti 178 árið fyri.

Gongdin í Noregi eins og í øðrum londum hevur annars verið hitt øvuta - at talið av ungum fiskimonnum hevur verið minkandi.

Vøksturin av ungum fiskimonnum árini 2007 til 2008 er 5,3 prosent.



*Talið av ungum fiskimonnum í Noregi er aftur veksandi*